STARVSLÝSING




# Starvsfólk til fíggjardeildina

Vilt tú arbeiða í eini altjóða fyritøku við møguleika fyri persónligari og fakligari menning?

Faroe Ship sóknast eftir tveimum ágrýtnum og sjálvstøðugum starvsfólkum at arbeiða á fíggjardeildini fulla tíð. Í báðum førum er talan um størv við víðfevndum uppgávum.

## Starv sum skuldararøktari

Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:

- Gjøgnumgongd av skuldaralistum
- Útsending av kontoavritum
- Gjaldsáminningar til kundar - telefonsamrøður/brøv
- Avstemming
- Dagligt samskifti við kundar og starvsfelagar á søludeildum o.ø.
- Eftirlit við, at innanhýsis mannagongdir um skuldararøkt verða hildnar
- Aðrar fyrifallandi uppgávur á fíggjardeildini

## Starv sum bókhaldshjálp

Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um:

- Vanligt bókhald
- Kreditorrøkt
- Aðrar fyrifallandi uppgávur á fíggjardeildini

### Førleikakrøv

Tú hevur góð samstarvsevni, arbeiðir sjálvstøðugt, ert opin og dugir væl at samskifta við kundar og starvsfelagar. Tú hevur viðkomandi roknskaparligt bakstøði við royndum frá líknandi starvi og hevur kunnleika til Microsoft Office.

### Umsóknir

Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum kunnu sendast við teldubrævi til bogin@faroeship.fo ella við vanligum brævi til Faroe Ship, Eystara Bryggja, Postboks 47, 110 Tórshavn, att.: Bogi P. Nielsen.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Boga P. Nielsen á tlf. 239049 ella 349049.

Vit vilja seta størvini skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 17. mars 2008.

SENDISTOVAN

FAROE SHIP
Góð sambond síðan 1919

Faroe Ship er flutningsfyritøka, sum saman við Eimskipafelag Íslands síðan 1. juli 2004 hevur myndað altjóða fyritøkuna Eimskip Group, ið er størsta flutningsfelag í Norðuratlanshavi, við egnum rutum til Evropa, USA, Baltalond og Ruslands.

Virkisøkið hjá Faroe Ship er innflutningur, útflutningur, innlendiskoyring, agency, vøruhotell og skundflutningsfyritøkan Faroe Express.

STARVSLÝSING




# Koyrisamskipari til Faroe Ship

### Starvið

Saman við tveimum øðrum koyrisamskiparum skipar tú fyri allari koyring av vøru, sum Faroe Ship varðar av. Faroe Ship hevur í dag 31 bilar, sum koyra um alt landið við sera ymiskum flutningi. Títt samband er í høvuðsheitum við viðskiftafólk og bilførarar okkara. Arbeiðsstaðurin kann vera í Tórshavn ella í Runavík.

### Førleikakrøv

Vit leita eftir einum ágrýtnum, samvitskufullum og sjálvstøðugum fólki. Samstarvsevnir, yvirlit og áhugi fyri úrslitum hava stóran týdning.

### Lønarviðurskifti og umsóknir

Løn og arbeiðstíð verða eftir avtalu. Umsóknir skulu sendast til Faroe Ship, Eystara Bryggja, Postboks 47, 110 Tórshavn, att.: Jákup Christiansen.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Jákup Christiansen á tlf. 349130 ella 230050.

Vit vilja seta starvið skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 17. mars 2008.

SENDISTOVAN

FAROE SHIP
Góð sambond síðan 1919

Faroe Ship er flutningsfyritøka, sum saman við Eimskipafelag Íslands síðan 1. juli 2004 hevur myndað altjóða fyritøkuna Eimskip Group, ið er størsta flutningsfelag í Norðuratlanshavi, við egnum rutum til Evropa, USA, Baltalond og Ruslands.

Virkisøkið hjá Faroe Ship er innflutningur, útflutningur, innlendiskoyring, agency, vøru- og frystihotell og skundflutningsfyritøkan Faroe Express.

Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM
&
PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
TELEFON 22 50 00
Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum
VIVA